

## Til Noregs at arbeiða

Veksandi arbeiðsloysi í Svøríki hevur fingið nógvar sviar at leita sær um norska markið eftir arbeiði. Svenska arbeiðsloysið er 5,7 prosent, men í fleiri av teimum minnu býunum er at kalla einki arbeiði til ungfólk, sum ikki hava nakra fakliga útbúgving. Tað ger, at fleiri ungir sviar eru farnir til Noregs at arbeiða, og sambært Aftenposten stendur tað ikki á at fáa arbeiði har. Ein ung kvinna sigur fyri blaðnum, at hon veit um 20 ungar sviar, sum eru komnir til Oslo, og at øll hava fingið arbeiði har.

Hugur og Hegni:

# Virðiligt minni um ein merkismann

**Fríggjadagin 28. november vóru 30 ár liðin, síðan fyritøkan KJ Hydraulik varð sett á stovn. Í hesum sambandi varð skipað fyri móttøku á Kambsdali, har nógv fólk var til steðar**

Tað serliga við hesi móttøku var, at samstundis varð løgd fram ein bók um fyritøkuna og stovnaran av henni Kári Johannesen, sum doyði í bestu árum í 2001.

Tað, sum var enn meira serstakt var, at bókin var skrivað av konu hansara Lillian í Lambanum. Tey, sum vóru til móttøkuna, fingu eitt eintak heim við sær. Hetta gav eisini móttøkuni ein serliga dám. Bókin er 248 síður, og hon er ein sera góð lýsing av einum manni og hansara lívsverk.

Stjórin Ólavur A. Olsen bjóðaði fólki vælkomið. Lillian greiddi frá lívinum saman við Kára og um virkið, sum hann bygdi upp. Menn, sum høvdu orðið, vóru Mortan, hjá Andreas, Johannesen, Jón Eliassen, Absalon Absalonsen og Osmundur Justinussen. Allir lýstu teir Kára sum ein merkismann, bæði sum fakmaður og sum menniskja. Hann var ein rættur snillingur innan maskinur og teknikk, og hann fekk stórt sæð alt at bera til. Hann eisini sera dámligur maður.



*Her er Lillian saman við Max Weihe, manninum og Bergur, yngsta soninum*

Kári var føddur 2. juli 1949, sonur Nicolinu og Viggo Johannesen, ættaður av Hædd í Klaksvík.

Tað var tíðliga, at Kári fekk áhuga fyri teknikki. Hann skrúvaði motorar sundur og setti teir saman og fekk mangt at rigga, sum kravdi tol og hegni. Eisini kom í barnaárunum hansara leiðaraevni til sjóndar.

Thorben beiggi Kára sigur frá tí sama. Tá ið pápin fekk ein fýrataksmotor í fýramannafarið, dugdi Kári betri enn pápin at fáa hann at rigga.

Farin úr skúlanum fekk Kári í 1963 læruplláss á smiðjuni Meka, har Esmar Simonsen var meistari. Hann fekk bronsjumedalju fyri sveinaroyndina. Kári fekk annars tað skoðsmál, at hann var ein framúr dugnaligur lærlingur, og tað tíðliga sást, at hann skaraði framúr.

Hann fór á maskinskúla í Havn og fekk "føroyska maskinprógvið." Hann fór tá sum 2. meistari við trolaranum Ólav Halga, har Jákup Oluf á Lakjuni var skipari. Túrin eftir gjørdist hann 1. meistari bert 21 ára gam. Tá var hann eisini við sínum hegni við til at bjarga Ólav Halga undan eini vanlukku.

Síðan fór Kári sum meistari við ídnaðarskipinum Koralfisk.

Tann 17. marts 1973 giftust tey bæði Kári og Lillian. Hon er dóttir Jacobinu og Solberg í Lambanum. Í 1974 fór Kári við nýggja Polarfisk hjá sama reiðarí. Men fyrst var tann avbjóðing, at skipasmiðjan var farin á húsagang. Reiðaríið leigaði hana at gera skipið liðugt. Kári fekk sum uppgávu at gera hydrauliska skipanina lidna. Hettta var eitt nýtt øki, men hetta evnaði hann eisini til fulnar.

Í 1975 fór Kári aftur í skúla og fekk maskinmeistaraprógv í 1976. Hann fór tá at arbeiða á Skála Skipasmiðju.




*Virkið*

### Byrjar sjálvur í kjallaranum

Nú koma vit til 1978. Kári hevði altíð havt hug til at fáa sær egið virki, og hetta varð ur nú verunleiki. Kjallarin í húsum teirra gjørdist verkstaður. Fyrsta uppgávan gjørdist at taka sær av tí tekniska á skipunum hjá Osmundi Justinussen. Kári fekk tá eisini eykalutagoymslu og tænastur fyri Rapp, sum er ein norsk verksmiðja, sum selur hydrauliska deksútgerð til fiskiskip.

Tað var skjótt, at Kári fekk ov mikið at gera einsamallur. Fyrsta starvsfólkið gjørdist Jón Eliasen úr Lorvík, sum framvegis er í starvi á deildini í Havn.

Lillian kom at taka sær av bókhaldinum. Framvegis var hetta strævið. Neyðugt var altíð at vera tøkur, tá ið brúk var fyri teimum. Hetta var ofta eisini um næturnar. Í 1981 varð aftur brúk fyri at seta meira fólk. Eftir eina tíð fór Kári at seta lærlingar, og í 1983 gjørdist Birgir





*Nógv fólk vóru komið saman*